# Luxus-døgurði á vágni

**Eitt øðrvísi summarkvøld var á skránni í Klaksvík, har menn høvdu riggað sær ein gamlan flaka til veitsluhøll**

SUMMARHUGNI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vakti ans, tá songur hoyrdist av vágni í Klaksvík leygardagin.

Høvið var stór veitsla, sum varð hildin á einum gomlum flaka, ið annars hevur ligið til ónyttu í fleiri ár.

Nakrir persónar høvdu tikið seg saman um eitt hugskot, og so gekk tað skjótt fyri seg. Telt varð sett á flakan, og kokkur varð bílagdur til eitt hugnakvøld av teimum heilt stóru.

Junglutrummurnar syrgdu fyri, at innbjóðingarnar vóru nóg nógvar í tali, og so var av álvara lagt upp til eitt rimmarkvøld.

Á matarlepanum var feskur hummari og flamberað fiskaflak, og tá hetta saman við drekkivørum varð fingið niðurum, stóð felagssangur á skránni.

Um trygdina verður annars sagt, at hendan var í lagi. Gyrðing varð sett kring flakan, og eisini var bjargingarbátur tøkur, um illa vildi til. Men eingin maður datt fyri borð, so tað vóru turrskøddir klaksvíkingar, sum sunnunáttina settu kósina aftur á fastlandið.



*Flakin sá ikki út av so nógvum, men innandura var rómurin øgiligur*



*Talan var um sanna gourmet-uppliving við tí besta, sum havið hevur at bjóða*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og támut veður og møguliga regn av og á, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og eystri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. í útsynning úr Føroyum stendur mestsum í stað. Eitt hátrýst, 1027 hPa. yvir Grønlandi viknar nakað.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning sunnan úr Føroyum grynnist. Høgættarákið yvir Føroyum heldur fram.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

21. juli — Mánin næstur jørðini
22. juli — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. juli | 05:33 | 18:03 | 04:33 | 17:03 | 04:48 | 17:18 | 07:33 | 20:03 | 08:33 | 21:03 | 03:48 | 16:18 | 02:48 | 15:18 | 05:48 | 18:18 | 06:48 | 19:18 | 05:18 | 17:48 | 06:33 | 19:03 |
| 21. juli | 06:32 | 19:02 | 05:32 | 18:02 | 05:47 | 18:17 | 08:32 | 21:02 | 09:32 | 22:02 | 04:47 | 17:17 | 03:47 | 16:17 | 06:47 | 19:17 | 07:47 | 20:17 | 06:17 | 18:47 | 07:32 | 20:02 |
| 22. juli | 07:30 | 19:59 | 06:30 | 18:59 | 06:45 | 19:14 | 09:30 | 21:59 | 10:30 | 22:59 | 05:45 | 18:14 | 04:45 | 17:14 | 07:45 | 20:14 | 08:45 | 21:14 | 07:15 | 19:44 | 08:30 | 20:59 |
| 23. juli | 08:25 | 20:52 | 07:25 | 19:52 | 07:40 | 20:07 | 10:25 | 22:52 | 11:25 | 23:52 | 06:40 | 19:07 | 05:40 | 18:07 | 08:40 | 21:07 | 09:40 | 22:07 | 08:10 | 20:37 | 09:25 | 21:52 |
| 24. juli | 09:16 | 21:40 | 08:16 | 20:40 | 08:31 | 20:55 | 11:16 | 23:40 | - | 12:16 | 07:31 | 19:55 | 06:31 | 18:55 | 09:31 | 21:55 | 10:31 | 22:55 | 09:01 | 21:25 | 10:16 | 22:40 |



Forelskað?

Vís tað í Sosialinum

javni
– Virkin og virðismikil

www.javni.fo